# Akureyri á Norðurlandinum



Einaferð var Akureyri næststørsti býur í Íslandi. Tað er hann ikki longur, tí bæði Kópavogur og Hafnarfjørður hava lagt høvuðsstaðin á Norðurlandinum aftur um seg. Býurin stendur tó í besta blóma, tí hann er framvegis týdningarmikil miðdepil fyri fiskivinnu, handil og tænastuveitingar. Í dag búgva á leið 16.000 fólk á Akureyri, sum er sera hugnaligur býur at vitja. Her er lutfalsliga oftani sól, og býurin íður í aktiviteti. Akureyri er kendur skúlabýur og hevur bæði universitet og aðrar hægri lærustovnar. Í løtuni verður eitt stórt mentanarhús bygd niðri við havnina, sum er um at vera liðugt. Fyri tey, ið hava hug at vitja norðurlandið, er Akureyri sjálvandi eitt gott stað at byrja frá, tí hiðani eru nógv tilboð um ymsar túrar í økinum. Eisini hevur býurin sjálvur nógv áhugaverd støð at vitja.

*Í størsta býi á íslendska norðurlandinum, Akureyri, búgva í dag 16.000 fólk*




















